tíðindablaðið **sosialurin**
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov

**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Høgni Mohr
**Ítróttur:** Jákup Mørk

**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin
**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir

**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820
**Telefax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** Sosialurin

# Landsstýrið manipulerar við tølum

***Oddagrein***

Um dagarnar er avdúkað, at landsstýrið hevur brúkt ymisk tøl, nú roynt verður at greiða frá fullveldisætlanini hjá landsstýrinum. Stórur er munur er á tølunum fyri búskaparvøksturin, sum landsstýrið hevur brúkt í einum tíðindaskrivi, og tey veruligu tølini fyri vøksturin í brutto-tjóðarúrtøkuni seinastu árini. Og vøksturin í tjóðarúrtøkuni hevur stóran týdning, tá vit skulu máta, hvussu búskapaurin hevur tað, og tá metingar skulu gerast fyri búskapargongdina komandi árini.

FF-blaðið hevur kannað tøl og er komið til ta niðurstøðu, at landsstýrið fuskar við tølum - tilætlað ella av misgávum. Tað vita vit ikki enn. Í einum tíðindaskrivi hevur landsstýrið sagt, at vøksturin í brutto tjóðarúrtøkuni - BTÚ - hevur verið 9,8 prosent seinastu seks árini. Men hesin vøksturin hevur bara verið eini 5 prosent sambært teimum kanningum, sum FF-blaðið hevur latið serfrøðingar gera. Eftir øllum at døma er prísvøksturin ikki drigin frá í tølunum, sum landsstýrið kunngjørd eftir fyrsta samráðingarumfar.

Greiða fekst heldur ikki á spurninginum, tá Hans Pauli Strøm spurdi Karsten Hansen um vøksturin í bruttotjóðarúrtøkuni á tingi mikudagin. Karsten Hansen og Anfinn Kalsberg søgdu, at á tíðindafundi høvdu teir upplýst, at vøksturin lá um 7 prosent seinastu árini. Hvørjum skulu vit nú trúgva?

Tað hevur týdning á vísa á, at fyri tað fyrsta eru seinastu árini fullkomiliga óbrúklig í øllum metingum, tí í 1993 og 1994 lá føroyska samfelagið meiri ella minni lamið og inntøkan var lítil. Men síðani hevur vøksturin verið metstórur. M.a. tí fiskiskapurin hevur verið góður, prísurin á fiski høgur og rentan lá. Tí er ábyrgdarleyst at tosa um so høgan vøkstur, sum landsstýrið ger fyri tey komandi árini.

Eisini er tað burturvið at rokna inntøkur frá oljuvinnuni í einum leitingarskeiði inn í metingarnar. Vøksturin í bruttotjóðarúrtøkuni hevur stóran týdning, tá longdin á eini skiftistíð skal ásetast. Er útlit fyri lítlum vøkstri, má skiftistíðin verða long og øvugt.

Í meðal hava lond ein vøkstur, sum liggur um 2 prosent. Og er hann 3 prosent, er talan um góð ár. Og tí er tað einki annað enn ein hvørvisjón, tá landsstýrið tosar um ein vøkstur, sum er væl oman fyri 3 prosent.

Fjølmiðlarnir hava sum heild umrøtt fullveldisætlanina rættiliga væl. Summir meiri og summir minni. Eisini kann eisini sigast, at fjølmiðlar hava viðgjørt summar tættir væl og virðiliga. Somuleiðis hava teir samanborið ætlanina hjá landsstýrinum við uppskotini hjá Javnaðarflokinum og Sambandsflokkinum.

Men bløðini, útvarpið og sjónvarpið eiga nú at kanna eftir, um tøl hjá landsstýrinum eru røtt. Og um tilfarið í uppritunum hjá serfrøðingum eru rætt endurgivið í Hvítubók. Seinastu avdúkingarnar benda á, at landsstýrið manipulerar við tølunum. Og tað er ikki í samljóð við føgur orð um greiðar linjur og at alt skal kannast og leggjast fram, so fólk hava eina haldgóða grund at taka støðu út frá.

***Sosialurin***

Viðmerking:

# Politiskar programnevndir

Í seinastu viku, vórðu programnevndir settar fyri Útvarp Føroya og Sjónvarp Føroya.

Fráfarni landsstýrismaðurin í mentamálum, Signar á Brúnni úr Tjóðveldisflokkinum, setti hesar nevndirnar.

Í Dimmalætting týsdagin stendur, at limirnir í programnevndunum umboða nógvar ymiskar samfelagsbólkar, og at teir eisini eru væl spjaddir um landið.

Eg ivist heldur onga løtu í, at talan harafturat er um hampafólk, sum í allar mátar eru skikkaði til hesar nevndarsessir. So langt er alt í lagi.

Men tá hugt verður eftir hvar hesir persónar standa politiskt, so má ásannast, at teir ikki eru so spjaddir. Í báðum nevndunum hevur Tjóðveldisflokkurin nevniliga einsamallur meirilutan.

Á tingfundi mikudagin varð upplýst, at av teimum tilsamans 14 nevndarsessunum, verða heili 10 mannaðir av tjóðveldisfólkum. - Neyvan man hetta vera av tilvild!



**Fullveldisdemokrati**

Landsstýrið ætlar um ikki so langa tíð at hava fólkaatkvøðu um ríkisrættarligu viðurskiftini. Einki er at ivast í, at fjølmiðlarnir í tí sambandi fara at spæla ein avgerðandi leiklut. Tí má tað sigast at vera sera ódámligt, at Tjóðveldisflokkurin nú roynir at ”seta seg á fjølmiðlarnar”, fyri á tann hátt at tryggja, at tað sum har verður sagt, er til teirra fyrimun.

Men hetta verður helst sum so mangt annað her á landi. Tað verður tosað um tað í eina tíð, og so er alt gloymt, - og nevndirnar kunnu fara til arbeiðis.

**Helgi Abrahamsen**

# Meira politiskt enn løgfrøðisligt

Tá ið ein miðvikudagin sat frammanfyri útvarpinum og lýddi á dómin, um eg so má siga, yvir Signar á Brúnni, vóru tað nøkur ting, sum eg ikki kann lata fara aftur við borðinum.

Serliga var tað Bjørn á Heygum, løgfrøðingur, sum so avgjørdur vildi hava alt at snúgva seg um hetta eina málið – at Signar á Brúnni hevði brotið lógina og tí var noyddur at fara frá.

Eg havi varhugan av, at Bjørn á Heygum hevur sett nakað í gongd, sum ongan enda átti at havt, tí sum løgfrøðingur má Bjørn á Heygum vita, at tað ber ikki til at byggja eina framtíð við at ignorera fortíðina. Nei, so einfalt er tað ikki. Og hjá dómsvaldinum hevur tað altíð verið kutyma at rætta seg eftir tí, sum er farið fram frammanundan.

Sjálvandi skulu vit ikki bera í bøtuflaka við nøkrum, sum ikki er lógligt, men er hetta málið ikki meira politiskt enn løgfrøðisligt.

Bjørn á Heygum hevði dámt best, um hann ongan tjóðveldismann sá í landsstýrinum. Hugsið tykkum um nú Signar á Brúnni hevði sløkt sjónvarpskíggjan á Ólavsøku. Tað hevði verið eitt ramaskríggj yvir alt Føroya land. Hugsið tykkum um øll hesi høgt løntu ráðgevarar og embætisfólk eisini høvdu fingið sekkin.

**Eingin logikkur**

Nei, her skuldi finnast ein syndabukkur, og allir fuglfirðingar vita, at Signar er ein stak skikkiligur maður og hevur góð evni, men hetta er ikki fyrstu ferð, hann er lumpaður.

Eg vóni, at Hergeir Nielsen fær góð kort á hondina av tí, sum Bjørn á Heygum er farin út í. Og eg tori siga, at um Bjørn á Heygum heldur hetta verða eitt groft lógarbrot – næstan sum at stjala – at Signar á Brúnni tekur pening frá øllum Føroya fólki, og gevur øllum Føroya fólki hann aftur í hesum føri ein lýsandi skíggja, so tori eg siga, at tað er eingin logikkur í hesi somu heimastýris-skipanarlóg sum Bjørn á Heygum sjálvur hevur skrivað – tað stendur rimmar fast.

**Hans J. Hansen**

# Næmingar mótmæla verkfallinum

Viðvíkjandi verkfallinum hjá Føroya Lærarafelag, vilja vit gera vart við okkara ónøgd. Sum flest øllum kunnugt nærkast fráfaringarroyndin nú, og í ringasta føri kann henda keðiliga støða millum Lærarafelagið og Fíggjarmálastýrið gera at skrivliga fráfaringarroyndin verður útsett.

Hetta kemst, sum tit helst vita av, at teir lærarar, ið eru tænastumenn, ikki kunna átaka sær at gera verkfals rakt arbeiði. Tískil vera allar uppgávurnar til skrivligu fráfaringarroyndina ikki lidnar fyrr enn verkfallið er liðugt.

Páskaroyndin er avlýst vegna verkfall. Tað halda vit vera sera keðiligt. Tað er ikki serliga nógv skil á skúlanum. Nógvir næmingar møta ikki upp í skúla um dagarnar, hetta fyri at vísa okkaru stóru ónøgd við, at vit vera hildin sum gíslar millum partarnar báðar.

Vit vilja hervið siga, at Føroya Lærarafelag hevur okkara fulla stuðul í hesum máli, og at vónandi verður ein loysn á málinum heilt skjótt, tí at sum støðan er nú, er hon ótolandi fyri okkum næmingar.

**Vinarliga,**
**Framhaldsdeildin í Miðvágs-Sandavágs skúla**

# Mætir listamenn á Meiarínum

*Nú ongin sjónleikur er í húsinum, bjóðar »Gríma« hølini fram til ymisk onnur tiltøk – sum tey siga í »Grímu« »Meiaríið skal vera eitt livandi mentunarhús í miðbýnum«*

Komandi sunnudag 2. apríl kl. 16 verða verk hjá fýra mætum listarmonnum framførd: Rithøvundunum Goethe (1749-1832) og Schiller (1759-1805) og tónaskøldunum Haydn (1732-1809) og Beethoven (1770-1827). Allir fýra virkaðu um somu tíð, í sama umhvørvi og sama tíðaranda. Goethe og Schiller arbeiddu saman í Weimar, Haydn var lærari hjá Beethoven og í síni 9. Symfoni brúkar Beethoven yrkingina hjá Schiller »An die Freude«.

Nikolas Kapnas, violin, Stamen Stantchev, klaver og Jens Christian Guttesen, cello framføra 2 klavertrioir: Haydn, D-dur nr. 6 og Beethoven, opus 3 nr. 1 í C-moll.

Birita Mohr og Súsanna Tórgarð lesa yrkingar hjá Goethe og Schiller.

Tað eru tónleikararnir, Konsertfelagið og »Gríma« sum skipa fyri hesi konsertini.

Í steðginum verður høvi at hugna sær við einum kaffimunni og heimabakaðari køku.

Atgongumerkið á 80,- kr. fáast við dyrnar ein tíma frammanundan – børn sleppa ókeypis inn saman við vaksnum.






# Norðborg kemur á Klaksvík leygardagin

*Hósdagin landaði »Norðborg« um 700 tons av kalllodnu til ídnað í Ålesund og eini 300 tons av frystari kvennlodnu til japanska marknaðin. Leygardagin verður »Norðborg« á Klaksvík at gera klárt til svartkjaftin*



*Nýggi Norðborg kemur fyri fyrstu ferð til Klaksvíkar leygardagin*

ÓLAVUR Í BEITI

Tað hevur ikki verið nøkur long vertstíð hjá »Norðborg« í lodnuni, men úrtøkan hevur verið góð, verður sagt á reiðarínum Pf. Hvalnes, sum eigur »Norðborg«. Tað er serliga frysta kvennlodnan til japanska marknaðin, sum hevur givið skipinum eina góða byrjan.

Higartil hevur »Norðborg« fiskað eini 1000 tons til japansku stórfyritøkuna Hanwa, sum selur víðari til japanskar framleiðarar, og prísurin hevur ligið um 8-10 krónur kilo fyri frystu kvennlodnuna. Kalllodnan verður seld til ídnað, har prísurin er um 30 oyru kilo.

**Frysta svartkjaft til matna**

»Norðborg« fór á lodnuveiði tann 6. mars og longu nú er vertstíðin fyri kvennlodnuni til japanska marknaðin liðug, og farið verður tí nú at fiska svartkjaft, verður sagt á reiðarínum. Og eisini viðvíkjandi svartkjaftinum sær út til at nýggjar royndir fara at verða gjørdar við at frysta svartkjaftin til matna. Samstarv er fingið við áhugaðan keypara av frysta svartkjaftinum til matna, men reiðaríið hevur ikki enn tikið endaligu avgerðina.

Tá ið vertstíðin fyri svartkjaft er umliðin einaferð í mai, verður farið at fiska sild at skera til flak, og reiðaríið metir at hesin fiskiskapur heldur fram ári út. Viðvíkjandi søluni av kvennlodnu til japanska marknaðin, verður mett, at sama avtala verður gjørt við japansku stórfyritøkuna Hanwa komandi ár.

Hósdagin var »Norðborg« í Ålesund í Noregi og legði lodnu upp, 700 tons av kalllodnu til ídna og eini 300 tons av frystari kvennlodnu til japanska marknaðin.

# Føroyingar við á listastevnu

EYÐUN KLAKSTEIN

Fýra føroyskir listamenn vera við á eini listastevnu, sum verður hildin í Hillerød í vikuskiftinum.

Talan er um eina stevnu, har 16 donsk gallarí sýna fram ymisk listarverk.

Øssur Mohr er millum tey, sum sýna fram á básinum hjá Kunstgalleriet í Slagelse.

Eyðun av Reyni og Amariel Norðoy luttaka hjá Galleri Kløver, og verk hjá Mykines verða eisini við á stevnuni.

Dansk Kunstemesse, sum stevnan verður kallað, er í Frederiksborghallen í Hillerød, og hon letur upp í dag kl. 17.00.

Opið er eisini leygardagin og sunnudagin.

Talan er um eina sera stóra stevnu, sum felagið hjá donskum listafólkum skipar fyri. Tað verða hildnar nakrar slíkar stevnur á hvørjum ári.



*Øssur Mohr er við á listastevnuni í Hillerød*



*Vinnulívið í Norðoyggjum mótmælir siglingini um Leirvíksfjør. Mynd: Eyðun Klakstein*

# Mótmæla siglingina um Leirvíksfjørð

*Útflutningsvinnan í Norðoyggjum líður undir, at Ternan nú siglir um Leirvíksfjørð*

EYÐUN KLAKSTEIN

Klaksvíkar býráð og umboð fyri vinnuna í Norðoyggjum mótmæla nú siglingina um Leirvíksfjørð.

Í einum skrivi, sum er sent Reidari Nónfjall, stjóra á Strandferðsluni, siga umboð fyri býráðið og vinnuna, at siglingin um Leirvíksfjørð er ikki nøktandi, nú Ternan er farin at røkja siglingina, meðan Dúgvan verður umvæld.

– Seinastu árini er framleiðslan í Norðoyggjum vaksin sera nógv, og hetta hevur sett økt krøv til samferðsluna við meginøkið, verður sagt í skrivinum.

Víst verður á, at Dúgvan longu er vorðin ov lítil til siglingina um Leirvíksfjørð, og tí endar tað við ruðuleika, um Ternan skal sigla eftir somu ferðaætlan sum Dúgvan.

– Ternan má byrja at sigla eftir nýggjar ferðaætlan við nógv við fleiri túrum. Vit hugsa ikki um ein ella tveir túrar fleiri, men eina tvífalding av túratalinum, siga býráðið og vinnan í skrivinum.

– Í øðrum lagi krevja vit, at Ternan I má setast inn á farleiðina til at flyta smærru akførini.

Ætlanin er at Ternan skal røkja Leirvíks-farleiðina alla næstu viku eisini.